# Sluppu við skelkinum

**Nýggja gólvið í maskinhøllini hjá Føroya Fiskavirking í Miðvági sprotnaði og loysnaði upp aftur, eftir at tað var lagt á. Tað fer at seinka útbyggingini í umleið eina viku ella so**

ÚTBYGGING
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Arbeiðið við at umvæla maskinhøllina á Føroya Fiskavirking í Miðvági er seinkað umleið eina viku*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Miðvági:**
Eitt lítið óhapp við nýggja gólvinum í maskinhøllini á flakavirkinum hjá Føroya Fiskavirking í Mivági ger, at tað fer at ganga ein vika eyka, til fólk aftur sleppa til arbeiðis á virkinum.

Nýggja gólvið, um lagt varð á, loysnaði í støðum, og neyðugt var at taka tað uppaftur og stoypa av nýggjum, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri á Føroya Fiskavirking.

– Tíbetur var tað minni, enn vit óttaðust fyri, sigur hann. Nýggja gólvið var leyst í støðum, og tað varð so tikið upp og lagt aftur av nýggjum. Tað liggur nú og stadnar. Væntandi kann farast aftur til arbeiðis í viku seks, sum er fyrst í februar, sigur hann.

Tað, sum hent er, greiðir Meinhard Jacobsen frá, er at onkur smávegis misskiljing hevur verið, tá gólvið varð lagt á. Tað, sum skivað er í donsku vegleiðingini, er fylgt gjølla. Kortini hendi tað óhapp, at límingin ikki tók við, og tí kom bjølgur í ymsastaðni.

Fryktandi var fyri, at alt gólvið mátti tkast uppatur, men tað gjørdist tíbetur ikki neyðugt, sigur Meinhard Jacobsen. Funnið varð fram til tey støðini, har límingin ikki hefti, og so varð brotið upp aftur og lagt av nýggjum har.

### Óheppið

Meinhard Jacobsen heldur, at tað er óheppið at vera í pressuni í heilum.

Her sipar hann til tosið um einskiljing - privatisering - av Føroya Fiskavirking. Tað skapar ikki tryggleika hvørki so ella so, tá alla tíðina verður tosað um framtíðina hjá fyritøkuni við ymsum forteknum. Onkur vil privatisera í smáum og onkur í stórum. og upp aftur onkur annar vil als ikki gera nakrar broytingar.

Støðan hjá stjóranum er greið. Tað sama er hon hjá Grunninum, sigur hann.

Meinhard Jacobsen vísir á, at hann fyrr hevur sagt, at hann er fyri privtisering av Fiskavirking, tá tíðin er búgvin til tess. Men hann heldur, at tað skal vera øll heildin, sum verður privatiserað.

Sjálvandi ber ikki til at tryggja, at hetta so verður soleiðis um allar ævir, tí hvat ein nýggur eigari ger, má hann sjálvandi sjálvur avgera. Men stjórin á Føroya Fiskavirking er ikki í iva um, at tað konseptið, sum nú er, er skilagott.

### Trekur marknaður

Tað er trupult at selja fisk í løtuni, sigur Meinhard Jacobsen. Marknaður tykist líkasum uppsteðgaður. Hann flytir seg einki, sigur hann.

Saltfiskurin er tað einasta, sum eitt av lívi er í. Men restin er tung at fáast við, sigur hann.

Hvør orsøkin er, vil hann líkasum ikki geva nakað einstakt boð uppá. Tí tað kann vera so mangt. Men bara at leggja skuldina á kinesarar og russar ber ikki til, er Fiskavirkisstjórin sannførdur um. Tað munnu helst vera fleiri samanfallandi orsøkir til, at tað ikki gongur so væl í løtuni.
Meinhard Jaocbsen heldur seg ikki vita um, at tað nakrantíð fyrr hevur verið so tungt at selt fisk fyrr.

# Lítið av grind í fjør

**Náttúrugripasavnið hevur gjørt upp, hvussu nógvar grindir doyðu í Føroyum í fjør**

GRIND
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*

Knappliga 700 hvalir løgdu beinini í Føroyum í fjør. Av hesum vóru 503 grindahvalir.

Drápini vóru 11 í tali, og størsta grindin taldi 153 grindahvalir. Tað var í Hvannasundi tann sjeynda august. Tó vórðu tveir hvalir fleiri dripnir í Hvalvík fýra dagar frammanundan. Men av teimum vóru tríggir hvessingar, sigur Náttúrugripasavnið í yvirlitið, sum komið er.

Vert er at leggja merki til, at í yvirlitinum yvir teir tilsamans 694 hvalirnar, sum løgdu beinini í fjør, eru tvær nísur. Hvessingarnir eru tríggir. Hvítskjórutir spingarar eru 186, og 503 grindahvalir vórðu dripnir í fjør.

| Dagur | Hvalvág | Hvalir | Skinnatal | Slag |
|---|---|---|---|---|
| 6. mai | Tangafjørður | 2 | | nísur |
| 21.mai | Húsavík | 24 | 244 | grindahvalir |
| 3. august | Hvalvík | 152 | 1.391 | grindahvalir |
| 3. august | Hvalvík | 3 | | hvessingar |
| 7. august | Hvannasund | 153 | 1.214 | grindahvalir |
| 26.august | Hvalvík | 104 | | hvítskjórutir springarar |
| 5.september | Tórshavn | 6 | | hvítskjórutir springarar |
| 6.september | Tórshavn | 130 | 864 | grindahvalir |
| 6.september | Hvannasund | 50 | | hvítskjórutir springarar |
| 6.september | Tvøroyri | 6 | | hvítskjórutir springarar |
| 12.september | Klaksvík | 20 | | hvítskjórutir springarar |
| 1. desember | Tórshavn | 44 | 254 | grindahvalir |
| Tilsamans | 5 grindir við | 503 | | grindahvalum upp á 3.968skinn ella 198 gyllin og 8 skinn |
| Tilsamans | 5 grindir við | 186 | | hvítskjórutum springarum |
| Tilsamans | 1 grind við | 3 | | hvessingum |
| Tilsamans | 1 grind við | 2 | | nísum |





# 150 tons av sjógvi í maskinrúminum




*Ein lagnumorgun. Flaggskipið í føroyska flotanum, Norrøna, siglir tríggjar ferðir á land og fær stóran skaða*

**Tað var, sum ein óndur dreymur at síggja flaggskipið í føroyska flotanum, Norrønu, liggja og "gnaga" grót henda morgunin, óhappið hendi**

NORRØNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Skipið er risastórt eftir okkara mátistokki, og vindurin var frískur, tá ið snarast skuldi inn um molan lagnudagin.

Syndarligt var at síggja henda nýggja, stóra og hvíta skrokkin hjálparleysan liggja uppat grótinum frammanfyri Vónavirkinum á vestaru bryggju.

Tey, sum sóu myndirnar í SvF, vistu ikki rættiliga, hvat tað var, sum hendi. Skiparin, Ólavur Hovsgarð, er royndur maður á brúnni, og eingin ivaðist í, at hann royndi at gera sítt besta.

Og kortini var tað, vit sóu, ein veruleiki.

Skipið sigldi tríggjar ferðir á land hendan morgunin, og meira óheppið kundi tað væl saktans ikki verið.

### Vindurin vaks

Ólavur Hovsgarð, skipari, hevur avgjørt ikki at úttalað seg alment um málið, men hevur saman við øðrum givið sjófrágreiðing um hendingina.

Kári Durhuus, fjølmiðlaráðgevi hjá Smyril Line, sigur, at tá ið skipið nærkaðist hendan morgunin, segði Havnaskrivstovan, at vindurin lá um 10-17 metrar um sekundið.

- Í somu løtu, sum skipið skuldi snara inn um molan, kom eitt æl og vindurin, sum lá inn á stýriborðssíðu, vaks uppí 21-22 metrar um sekundið. Næmingar á Føroya Sjómansskúla hava roknað út, at við slíkari vindmegi, var trýstið á stýriborðssíðu eini 100 tons.

Kári sigur, at vindurin førdi til, at skiparin ongantíð fekk gronina á Norrønu uppí vindin, so hann kundi snara skipinum inn um molan.

- Norrøna rendi tí gronina á bakborðssíðu inn í oljubryggjuna, og síðan dreiv bakborðssíða inn í móti grótinum, sum liggur suður úr bryggjuni. Við tað, at grótið, sum er lagt út, skráar úteftir, tók reyvin og bakborðsskrúva í grótið.

### Ikki samsvar

Kári sigur, at Norrøna hevur fýra høvuðsmotorar og tvær skrúvur. Trý av skrúvubløðunum á bakborðsskrúvu styttust einar 40 cm., og fjórða blaðið minkaði við eini helvt, tá ið hesi tóku í grótið.

- So vítt eg veit, slóknaði eingin motorur.

Fjølmiðlaráðgevin veit at siga, at samsvar er ikki millum tað, sum teir í maskinrúminum siga og tað, sum menninir á brúnni siga í frágreiðingini.

- Eftir at skrúvan hevur tikið, meina teir í maskinrúminum, at kraft er á maskinunum alla tíðina, men at bakborðsskrúva bert virkar 50%. Á brúnni halda teir uppá, at skipið fullkomiliga missir megina í bakborðssíðu eftir stoytin.

Kári sigur, at tað, sum síðan hendir, er, at Norrøna sleppur leys aftur og fer inn í hylin.

- Á veg útaftur, rennur skipið á molan, og tá kemur hol miðskeiðis í skipið. Leiðin ber nú útaftur um molan.

Tá er tað, sigur Kári, at menninir í maskinrúminum boða frá, at skipið tekur sjógv inn í maskinrúmið.

### Nógvur sjógvur

- Skiparin avgerð at sigla innaftur í havnina, samstundis sum roynt verður at leggja skipið í stýriborð, so holini ikki taka sjógv inn. Tað eydnast at leggja skipið so mikið, at bakborðssíða lyftist umleið ein hálvan metur upp – og tá kemur ikki meira sjógvur í skipið.

Men heldur ikki aðru ferð, eydnast skiparanum at fáa skipið inn í hylin, og Norrøna endar aftur á oljubryggjuni.

- Maskinmeistarin metti, at eini 150 tons av sjógvi vóru í maskinrúminum, tá ið pumpingin byrjaði.

Kári sigur, at sjógvur eisini var komin inn í bógskrúvurúmið og aftur um skottini í maskinrúminum.

### Kostnaðurin ókendur

Spurdur, hvussu nógv umvælingararbeiði væntandi fer at kosta, sigur fjølmiðlaráðgevin, at hetta er ógjørligt at siga nakað neyvt um, fyrr enn skipið hevur verið í dokk.

Biðið er um tilboð uppá at umvæla Norrønu, og í SvF hóskvøldið varð mett, at skipið antin verður umvælt í Týsklandi ella Póllandi.

Sjálvur væntar Kári Durhuus, at umvælingararbeiði helst verður gjørt í Týsklandi.

- Men fyrr enn avgerðin er tikin, kann eg ikki siga hetta við vissu, leggur hann aftrat.

# Norröna antin til Týsklands ella Póllands

**Í gjár lótu tær seks skipasmiðjurnar – fýra í Týsklandi og tvær í Póllandi – Smyril Line tilboð uppá umvælingina av Norrønu eftir skaðan, skipið fekk, tá ið tað tríggjar ferðir rendi á land á havnarvág herfyri**

NORRØNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Einir 30 mans, umboðandi hesar seks skipasmiðjurnar, hava verið í Føroyum og kannað skaðarnar, sum Norrøna hevur fingið. Heimaftur komnir hava teir roknað uppá, hvat tað fer at kosta at umvæla skipið.

Jóannes á Váli, fíggjarstjóri hjá Smyril Line, visti tó ikki fyrrapartin í gjár at siga, hvat úrslit skipasmiðjurnar eru komnar til.

Hann væntar, at tað verður torført at siga neyvt, hvat umvælingin fer at kosta, fyrr enn skipið hevur verið í dokk.

### Eingin hóming

Spurdur, um hann ikki hevur eina hóming av kostnaðinum, sigur hann, at tað hevur hann ikki.

- Eg havi ikki sæð tilboðini enn, og tí kann eg einki siga um, hvat umvælingararbeiði fer at kosta.

Spurdur, nær hann væntandi veit okkurt at siga, sigur hann, at hetta í fyrsta lagi verður einaferð seinni í dag.

- Tað eru tveir partar, sum skulu taka støðu til tilboðini, Smyril Line og Sjóvátryggingin, og enn er eingin støða tikin, sigur hann.

Jóannes á Váli sigur, at ætlandi skuldi Norrøna fara av Havnini klokkan 10 gjáramorgunin, men tá ið vit tosaðu við hann um 11-tíðina, lá skipið framvegis.

- Skipið hevur fingið loyvi at sigla við egnari megi. Norrøna hevur fýra høvuðsmotorar og tvær skrúvur. Á ferðini til Týsklands ella Póllands verður bert siglt við tveimum motorum og aðrari skrúvuni, sigur fíggjarstjórin.

### Fyribilsumvæling

Seinastu dagarnar hava menn hjá Tórshavnar Skipasmiðju fyribilsumvælt Norrønu, so hon kann fara av landinum og sigla til skipasmiðjuna, sum fær arbeiði at umvæla skipið.

- Skipið er tett og styrkt, har skaðin stóðst.

Jóannes á Váli sigur, at alt arbeiði verður gjørt av nýggjum, og umframt stálarbeiði, er talan um eitt nú rør og el-installatiónir, sum eru kroyst av stoytinum, ið skipið fekk.

So mikið nógvur sjógvur var í maskinrúminum, tá ið hann var mestur, at svinghjólið á motorinum longst í bakborð var byrjað at oysa sjógv upp við sær.

### Vóna tað besta

Norrøna er undir garantii í eitt ár, og tí hevur Smyril Line ein mann, sum tekur sær av hesum partinum. Maðurin er Hjalgrímur Joensen.

- Enn er ov tíðliga at siga, hvussu langa tíð, umvælingararbeiði fer at taka, men vit vóna, at tíðin ikki verður nógv longri enn ein mánaði, sigur Jóannes á Váli, fíggjarstjóri, at enda.